# Nýggj vallóg

JÓGVAN SUNDSTEIN



Herfyri hevði eg eina grein um nýggja valskipan til løgtingsval. Niðurstøðan hjá mær var, at ikki ov nógvar broytingar áttu at veri gjørdar í núverandi valskipan, og serliga átti ikki at verið minkað um lokalu umboðanina á tingi.

Tað eru serliga tvey fyribrigdi menn ikki rættiliga kunnu foreina seg við:

1. "Skeiva" umboðanin av tingmannatalið í mun til atkvøðutalið hjá flokkunum

2. Tað at ein tingsessur í stóru valdønunum "kostar" meira enn ein í smáu valdømunum

Til tað fyrra spurningin er at siga, at hetta kann hjálpast uppá við at hava fleiri eykamandatir ella útjavningarmandatir. Annars er tað ein spurningur, um hetta er so skeivt kortini. Valini vera nógv meira áhugaverd, tá einstøk valdømi kunnu avgera samansetingarnar, og persónarnir koma at hava nógv meira at týða. Til dømis hevur tað nógv størri týdning, at ein flokkur sum fær 7 tingmenn, fær hesar í 6 ella 7 valdømum, heldur enn hann hevði fingið teir í einum stórum landsvaldømi, hvar kanska ein ella tveir persónar fáa flest allar persónligu atkvøðurnar, meðan seinastu fimm fáa fáar atkvøður, og tilvildin ræður fyri hvørjir hesir persónar vera.

Til seinra spurningin kann sigast, at tað ger einki, um tingsessirnir kosta minni í smærru valdømunum enn í teim størru. Tað avgerandi er, at øll vera umboðað. Demokratiið er ikki ein spurningur um matematiskan rættleika, men ein spurningur um, at so nógv áhugamál sum møguligt verða umboðað. Tí hevur tað nógv størri týdning, og er nógv meira demokratiskt, at t..d. Sandoygging ella Vágarnar verða umboðað við tveimum løgtingsumboðum enn at Suðurstreym verður umboðað við 10 ella 11 umboðum.

Eg fari tí at koma aftur til tað sum eg skrivaði fyri góðum mánaða síðani og seta tað upp ímóti nýggja uppskotinum hjá Sjálvstýrisflokkinum. Eg skal tó viðmerkja, at eg meti tað uppskotið at vera rættiliga moderat, men kortini hevur í sær nakrar broytingar, sum ikki tæna demokratiinum ella fjølbroyttari umboðan.

### Sjálvstýrisflokksins uppskot

Hetta uppskotið loyvir í mesta lagi 33 tingumboðum ímóti nú 32. Tað er í lagi. Men samstundis skulu vera 28 umdømisvald í 5 valdømum móti nú 27 í 7 valdømum. Uppskotið hevur við sær øking av umdømisvaldum í stóru valdømunum (Suðurstremoy og Eysturoy) og minking í smáu valdømunum (Suðuroy/Sandoy) og (Vágoy/Norðstreymoy). Hetta hevur við sær, at lokal umboðanin verður veikari, serliga kann Sandoyggin koma at vera við sviðið soð, tí Suðuroyggin hevur lutfallsliga størri fólkatal. Og áhugamálini hjá hesum báðum oyggjunum kunnu vera ymisk. Sum eg havi nevnt frammanfyri er rættari vegurin at fara heldur at luta færri umdømisvald til stóru valdømini. Eftir míni metan er veikleikin við uppskotinum bæði ein samanlegging av valdømum og nógvar umdømisvaldar til størri økini.

### Mítt uppskot

Høvuðsinnihaldið í mínum uppskoti er, at verandi valdømi verða varveitt, at smáu valdømini varveita sínar umboðanir, ein lækking av umboðunum í stóru valdømunum, ein hækking til 33 tingumboð tilsamans og at eykavaldu umboðini vera 9 í staðin fyri nú 5. Uppskotið sær soleiðis út:

| | | |
|---|---|---|
| Norðoya valdømi | 4 | valdømisvaldir |
| Eysturoya valdømi | 4 | valdømisvaldar |
| Norðstreymoyar valdømi | 2 | valdømisvaldar |
| Vága valdømi | 2 | valdømisvaldar |
| Suðurstreymoyar valdømi | 6 | valdømisvaldar |
| Sandoyar valdømi | 2 | valdømisvaldar |
| Suðuroyar valdømi | 4 | valdømisvaldar |
| **Tilsamans** | **24** | **valdømisvaldar** |
| Harafturat koma í mesta lagi | 9 | eykavaldir |
| **Hetta gevur tilsamans max.** | **33** | **tingmenn** |

Hendan skipanin tryggjar øllum valdømum umboðan, eisini teimum við lítlum fólkatali. Hinvegin vilja tey stóru valdømini, sum lutfallsliga fáa færri valdømisvaldar, fáa teir flestu av teim eykavaldu. Við fleiri eykavaldum verður tryggjað, at tann politisk/ideologiska umboðan verður lutfalsliga røtt, tað vil, at flokkarnir fáa lutfallsliga tingmannatal eftir sínum samlaðu atkvøðum fyri alt landi, meðan teir umdømisvaldu í smærru valdømnum tryggja lokalu áhugamálunum góðar umstøður. Annars skal eg eisini viðmerkja, at eg dugi ikki at síggja at ein broyting frá d`Hondts rokniháttí til Sainte-Lagues gevur nakra serliga meining og skuldi væl veri óneyðug.

Um hendan skipanin hevði verið nýtt við seinasta val í 2004 hevði úrslitið verið hetta;

| | A | B | C | D | E | H | Total |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya valdømi | 1.434<br>**2** | 602 | 741<br>**1** | 264 | 849<br>**1** | 148 | 4038<br>**4** |
| Eysturoya valdømi | 1.217<br>**1** | 2.012<br>**1+1** | 1..254<br>**1** | 529<br>**+1** | 1.254<br>**1** | 466<br>**+1** | 6.732<br>**4+3** |
| Norðstreymoyar vald. | 531<br>**+1** | 663<br>**1** | 489 | 60 | 582<br>**1** | 78 | 2.403<br>**2+1** |
| Suðurstreymoyar vald. | 2.041<br>**1+1** | 2.638<br>**2+1** | 2.267<br>**1+1** | 527 | 3,076<br>**2** | 788<br>**+1** | 11.337<br>**6+4** |
| Vága valdømi | 532<br>**1** | 663<br>**1** | 373 | 39 | 263 | 79 | 1.949<br>**2** |
| Sandoya valdømi | 259 | 105 | 326<br>**1** | 22 | 285<br>**1** | 26 | 1.023<br>**2** |
| Suðuroya valdømi | 516 | 818<br>**1** | 1.471<br>**2** | 20 | 581<br>**1** | 74 | 3.480<br>**4** |
| **Total** | **6.530<br>5+2** | **7.501<br>6+2** | **6.921<br>6+1** | **1.461<br>+1** | **6.890<br>7+0** | **1.659<br>+2** | **30.962<br>24+8** |

Hendan valskipanin hevði givið størsta flokkinum í atkvøðutali, Sambandsflokkinum, 8 tingmenn móti 7 eftir galdandi skipan. Hinvegin hevði Tjóðveldisflokkurin fingið 7 tingmenn og ikki 8, sum hann fekk eftir galdandi skipan. Tingmannabýtið hevði sostatt verið "rættvísari" í mun til atkvøðubýtið. So vítt eg dugi at meta um vil hjálagda uppskot altíð geva eitt rætt býti útfrá samlaðu atkvøðutølunum fyri alt landið.

Eftir frammanfyristandandi uppseting vil hvør tingmaður hjá teim ymsu flokkunum kosta í atkvøðum:

| | |
|---|---|
| A. Fólkaflokkurin | 933 atkv. |
| B. Sambandsflokkurin | 938 atkv. |
| C. Javnaðarflokkurin | 989 atkv. |
| D. Sjálvstýrisflokkurin | 1.461 atkv. |
| E. Tjóðveldisflokkurin | 984 atkv. |
| H. Miðflokkurin | 830 atkv. |

Orsøkin til, at Sjálvstýrisflokkurin hevur dýrasta tingmannin, er, at hann júst ikki náddi upp á brotspartin 1,5 fyri tað ein umdømisvaldur kostaði við útrokningini. Hinvegin kom Miðflokkurin uppá 1,7 og fekk sostatt 2 manns og harvið eisini teir "bíligastu". Hjá teim størru flokkunum eru tølini rættiliga jøvn.



*Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgtings, landsstýris- og løgmaður heldur ikki at ov stórar breoytingar eiga at gerast í valskipanini - serliga eigur ikki at verða minkað um lokalu umboðanina, heldur hann*

# John – ger heimaarbeiðið áðrenn tú loypir á bláman

JOHAN DAHL
løgtingsmaður



John the Joke(r) og hansara lítla innlit í, hvat fyriferst í útjaðaranum og við tí sum samgongan samtykti við sølu av Farmaleiðum vísur seg í hansara grein í Dimmalætting og Sosialinum.

At undirritaði gongur inn fyri privatisering og lækkan av skattinum er ongin loyna.

Tað at skatturin bleiv lækkaður samsvarandi tí, sum Sambandsflokkurin mælti til upp til seinasta val og sum eisini semja bleiv um í samgonguni hevur víst seg at verða rætt, tað má sjálvt John Johannesen ásanna.

At eg og flestu arðir í samgonguni vilja privatisera er púra rætt, men privatisering skal gerast við skili, hóast tað við eini so breiðari samgongu kann væntast at kompromis'ini føra til verri loysnir, tíverri.

Farmaleiðir er ein av hesum, og Atlantsflog við tí uppdeiling av søluni sum kemur at fara fram, ivaleyst eisini verður ein »hálvgóð loysn«.

Øll samgongan var samd um at Sandoyggin og Suðuroyggin ikki skuldu blíva verri fyri við søluni at farmaleiðum, og at tað tænastustøði sum var í hesum økjum skuldi halda áfram - men tíverri eftir at vit høvdu trýst á grøna knøttin í løgtinginum, vísti tað seg at hetta ikki var so og vóru vit bóndafangaðir!

Tá John Johannesen í síni grein sigur - sitat:

*»Tað hevur víst seg fyri Johan Dahl, at hann ikki fær vinnuvirksemi sítt í Vági at hanga saman, uttan at tað almenna flytur fisk fyri hann ímillum Kollafjørð og Havnina. Í Suðuroynni og ímillum Suðuroynna og Havnina tekur tað almenna sær framvegis av vøruflutninginum, tí hesar leiðir vóru ikki við, tá Farmaleiðir fóru á privatar hendur.« Sitat endað,*

So sigur hetta ikki so heilt lítið um, hvussu nógv John Johannesen hevur fingið við , TÍ tað almenna tekur sær nevniliga IKKI av farmaflutninginum longur, hvørki í Sandoynni ella Suðuroynni, so John, - títt heimaarbeiði er ikki í lagi - les betur upp á lektiuna ella tosa við strandferðslustjóran, so hesin kanska kann siga tær, hvat teir gera við farmaflutning og ikki, til Suðuroyar, Sandoyar og Kalsoyar.

At Johan Dahl saman við nógvum ørðum rekur vinnuvirksemið í Suðuroynni og hevur gjørt tað í mong ár, tí Johan Dahl og nógvir arðir framhaldandi trúgva upp á, at tað eisini skal bera til í útjaðaranum eigur hvørki at koma mær ella hinum vinnurekandi aftur um brekku.

Vit skulu hava somu møguleikar á flutningsøkinum sum allir arðir, og tað er ein partur av politikki samgongunar - vit krevja at okkara kostnaður og servica er tann sama, sum hjá restini av landinum og tað var eisini tað, sum avtalað var í samgonguni, men sum ikki helt tá endaúrslitið kom á borðið.

Eg tori at ásanna, at her eru skeivleikar og at vit hava gjørt ein feil - og eiga vit at rætta tann feilin sum í er komin, soleiðis at bæði Suðuroyggin, Sandoyggin og Kalsoyggin (sum eisini hevur sama trupulleika sum vit) fáa mistakið rættað aftur soleiðis sum avtalað varð í samgonguni.

Vit liva í einum oyggjasamfelag – har marknaðarøkonomisku treytirnar ikki virka á ávísum økjum sum her nevnt tá ta kemur til t. d. farmafluting, eiga vit at tryggja at tað verður á sama støði sum í restini av landinum.

John sigur, at Javnaðarflokkurin er tolin, jú víst - summir er ivaleyst tolnir, men tað sum eg havi upplivað greinskrivaran, so er hesin ikki ein av teimum, men kanska broytist hann við árunum.

Javnaðarflokkurin og John eiga á sama hátt sum undirritaði at tora at viðganga um gjørd verða mistøk, higartil havi eg so ikki sæð teir tora at viðgangið mistøk hvørki í leiðsluni ei heldur í flokkinum, - men nú hava teir so møguleikan í samband við at fáa tillagað farmaflutningin til Suðuroyar, Sandoyar og Kalsoyar, soleiðis at hesi øki verða røkt við farmaflutningi sambært teimum avtalum sum gjørdar vóru í samgonguni áðrenn farmaleiðir blivu seldar.

Vágur 18.08.2006